# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 06.03.2017 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Trúgvi Gudmundarson
Niels Jacob Thomsen
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen

Ikki møtt:

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Alzheimerfelagnum.**
   Søkt verður um stuðul í sambandi við ráðstevnuna "Gloym meg ei", ið felagið skipar fyri. Samtykt varð einmælt at stuðla tiltakinum við kr. 2.000.

2. **Umsóknir um fíggjarligan stuðul:**
   a) Danny & The Veetos til fløguútgávu.
   b) Tónleikabólkurin Bragdarlogi til fløguútgávu.
   c) Høgni Mohr til bókaútgávu um ferð kring Føroyar.
   d) Pætur M. Dahl til filmsverkætlan "Dánjal & Búi – Hví eru vit her?"
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla nøkrum av hesum.

3. **Uppskot til ábyrgdarprotokoll í sambandi við grannskoðan hjá Hvalbiar Kommunu.**
   Grannskoðanarprotokollin varð einmælt samtykt.

4. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

   **Tekniska nevnd:**
   - Skriv frá Búnaðarstovuni til borgara í sambandi við misrøkt av festi.
   - Skriv viðv. fundi um linjuføring av Hvalbiartunlinum millum Hvalbiar / Tvøroyrar kommunur og Landsverk / landsstýrismannin á økinum.
   - Skriv frá borgara viðvíkjandi samlibrunni.

**Vega- og havnanevnd:**

- Skriv frá borgara viðvíkjandi Drátti og um at leggja asfalt á grúsvegin.
- Kranin á Hamranesi.

**Trivnaðarnevnd:**

- Útbjóðingartilfar frá HMP Consult viðv. skiftan av taki á Roynhøllini.

**Fíggjarnevnd:**

- Nema journalskipanin – prísir.
- Ummæli av verklagslóg um Talgildu Føroyar.
- Umsókn um stuðul til bygdastevnuna í Hvalba 2017.

**5. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd (framløga Niels Olaf Eyvindsson):**

- Misrøkt av festi: Nevndin mælir til, at skrivið verður sent Vatnsýnisnevndini. Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum.
- Linjuføring Hvalbiartunnilin: Nevndin mælir til eina meira optimala tunnilsloysn enn 2.490 metrar. Samtykt varð einmælt at taka undir við, at linjuføringin verður sum víst við reyðum á hjálagda korti 3.170 metrar. Harumframt varð einmælt samtykt, at Hvalbiar Kommuna samskiftir við Landsverk um brúk av grótinum frá tunlinum og um gamla Hvalbiartunnilin.

**Vega- og havnanevnd (framløga Trúgvi Gudmundarson):**

- Dýping av Hvalbiar havnalag: Samtykt varð einmælt at fáa Hans Haraldsen at gera eina kostnaðarmeting uppá dýping inni í hylinum frá krananum og vestur.
- Vitin: Nevndin hevur fingið tilboð frá Oi-Electric uppá nýggjan vita á kr. 214.164 og mælir til, at hesin verður bílagdur. Samtykt við fýra atkvøðum fyri. Janus Thomsen, Niels Jacob Thomsen og Eir J. Norðberg tóku ikki undir við hesum.

**Trivnaðarnevnd (framløga Eir J. Norðberg)**

- Roynhøllin – nýtt tak: Nevndin mælir til biðja um tilboð uppá skiftan av takinum og at bygdarráðið tilskilar sær rætt til ikki at taka av innkomnu tilboðunum, um hesi ikki eru nøktandi. Samtykt varð einmælt, at HMP Consult bjóðar arbeiðið út.
- Ansingargjøld í dagstovninum: Nevndin hevur gjørt tilmæli í sambandi við gjøld fyri ansingarpláss á dagstovninum:

  | | |
  |---|---|
  | Vøggustovubarn 0-3 ár | **kr. 1.800** |
  | Barnagarðsbarn 3-6 ár | **kr. 1.700** |

  Systkinaavsláttur: 1. barnið 100% gjald, 2. barnið 75%, 3. barnið 50%, 4. barnið 25% av fulla gjaldinum.

Juli mánaði er ókeypis.

Frítíðarskúlin 1. – 3. flokk **kr. 1.000**
Juli og ½ august eru ókeypis
Samtykt við fýra atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum frá nevndini. Trúgvi Gudmundarson, Niels Olaf Eyvindsson og Magni Bertholdsen atkvøddu ikki fyri at hækka barnagarðsgjaldið.

**Fíggjarnevnd (framløga Janus Thomsen)**

- Nema journalskipan - prísir: Nevndin er samd um at játta pening til journalskipanina frá Nema. Talan er um eina lítla, einfalda skipan til tær minnu kommunurnar. Samtykt varð einmælt at játta hesum.
- Verklagslóg um Talgildu Føroyar: Nevndin mælir til at vísa til skriv frá Kommunufelagnum til Fíggjarmálaráðið hesum máli viðvíkjandi. Einmælt samtykt.
- Umsókn um stuðul til bygdastevnuna 2017: Samtykt varð einmælt ikki at stuðla.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 21.50

Janus Thomsen Trúgvi Gudmundarson Magni Bertholdsen Niels J. Thomsen

Niels Olaf Eyvindsson Gunnhild Mortensen Eir J. Norðberg